## Klumman



**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo

## Viðtaka lógir í blindum

Eg stúrsaði við, tá eg fyrst í flaggstríðnum las lesarabræv hjá Poul Michelsen, ikki tí hann ákærdi løgmann og Bjarna Djurholm fyri at lumpa, men tí tað hevði eina ræðandi avdúking. Hesin royndi politikari greiddi uttan himpr frá, at hann hevði atkvøtt fyri fíggjarlógini uttan at hava lisið annað enn tal-tilfarið. Hansara póstandur var enntá, at flest allir hinir tinglimirnir við honum høvdu gjørt tað sama, altso: viðtikið eina lóg, ið teir ikki kendu innihaldið í og avleiðingarnar av.

Hetta er ein ræðandi tanki, at okkara lóggevandi vald viðtekur lógir í blindum. Eg setti mær fyri, at finna útav, um støðan veruliga var soleiðis, sum Poul Michelsen segði, ella um hann var undantakið. Eg ringdi tí til politikarar í bæði andstøðu og samgongu, og spurdi um teir høvdu atkvøtt í atkvøðugreiðslum um lógir, ið teir ikki høvdu lisið. Allir viðgingu, at tað høvdu teir. Onkur vildi tó vera við, at tey altíð høvdu sett seg inn í lógirnar, áðrenn tey atkvøddu fyri teimum. Undanførslurnar hjá flest øllum tinglimunum, ið eg ringdi til vóru øgiligar. Eitt, ið fer eftir ferð varð ført fram, var at flokkarnir hava ábyrgdarpersónar, ið røkja hvør sítt øki, og hesir seta seg inn í málið vegna allan flokkin. Men her liggur eitt øgiligt álit á floksfelagarnar, bæði á teirra samvitsku og teirra førleika at seta seg inn í málini, størri álit enn eg havi á nógvar tinglimir. Útbreidda meiningin var tann, at eg lesi so nógv, sum eg fái tíð til, restina lesur onkur annar. Hetta gevur møguleikar fyri at manipulera. Í prinsippinum kann t.d. formaðurin í fíggjarnevndini seinkað fíggjarlógini heilt tilvitað, soleiðis at tingið ikki hevur stundir at lesa hana. Hetta kann hann uttan trupulleikar gera, tí tingið atkvøður glaðbeint fyri ella ímóti, í vónini um, at onkur hevur lisið lógina.

umborð

# Skiparar á egnum kjøli

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

**Brøðurnir, Tommy og Debes Sivertsen, eru skiparar á línuskipinum Kvikki og systirin, Malena, er stýrimaður við størsta og nýggjasta skipinum hjá Mærsk, Evelyn**



*Eins og við línuskipinum Klakki, har brøðurnir Líggjas og Bethuel Johannesen skiftast um at føra skipið, føra brøðurnir Tommy (t.v.) og Debes Sivertsen línuskipið Kvikk, ið er fyrrverandi Saturn III*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tey eru sjey systkin, og røturnar eru í Norðdepli, har foreldrini, Olaf og Marianna Sivertsen, búgva.

Tommy, sum er triðj elstur, er 46 ár og Debes, sum er yngstur, er 29 ára gamal. Í systkinaflokkinum er eisini Malena, sum er 31 ár og næst yngst.

Felags fyri Tommy, Debes og Malenu er, at teirra starv er á eini skipsbrúgv.

Tommy, sum er heimaskipari, og Debes, sum er skipsførari, skiftast um at føra línuskipið Kvikk, ið teir og onnur í familjuni eiga saman við øðrum.

Reiðari og útgerðarmaður er Torleif Sigurðsson, sum eisini eigur part í skipinum.

Malena er eisini útbúgvin skipsførari og hevur kjans sum stýrimaður við størsta og nýggjasta skipinum hjá stórreiðaríinum, Mærsk.

Skipið eitur Evelyn og liggur í løtuni í Århus.

Tommy og Debes eru tveir túrar við Kvikki í senn og síðan ein í landi.

Í illveðrinum eina sunnunátt herfyri sleit Kvikk fleiri endar, meðan skipið lá við Kósabrúnna. Hekkan á skipinum kom aftur ímóti stevninum á línuskipinum Klakki, sum síðan lá og bukaði niður á Kvikk. Skaði stóðst á skipið, og seinastu dagarnar hevur Stórabeding í Klaksvík umvælt skaðan.

Skipasýnið kravdi, at skaðin varð umvældur, áðrenn skipið loysti aftur.

Tíðliga seinnapartin hósdagin tók Kvikk agn og ís, og ætlandi loystu teir klokkan 19.

Vit vóru á bryggjuni, tá teir tóku útgerð til nýggjan túr og fingu eitt prát við skiparan hendan túrin, Tommy Sivertsen.

- Eg havi verið umborð á Kvikki í hesum umfari í eini trý ár og bróðir, Debes, hevur verið við sum skipari í umleið hálvt annað ár. Síðan vit gjørdust partaeigarar í skipinum, hava eg og Debes skifts um at ført skipið.

Áðrenn Tommy fór umborð á Kvikk, var hann stýrimaður við línuskipinum Pison í nøkur ár.

- Eg hevði verið í Danmark í eitt knapt ár, og afturkomin var eg fyrst tveir túrar við Kvikki, áðrenn eg fór umborð á Pison.

Men Tommy hevur eisini róð nógv út.

- Mín lívsleið á sjónum byrjaði eftir loknan skúla sum útróðrarmaður. Síðan var eg nakrar túrar við skipi og róði so útaftur.

Í eini seks ár var Tommy sum ungur við línuskipinum Jákupi B.

- Seinni hevði pápi mín útróðrarbátin Áslu, og eg førdi bátin á útróðri í fleiri ár. Vit róðu út av Klaksvíkini, sigur línuskiparin.

Seinasta ár hjá Kvikki var eitt sindur øðrvísi enn vanligt er hjá einum línuskipi.

- Vit settu upp í skipið á skipasmiðju í Hirtshals og vóru tískil úr vinnu í meira enn eitt hálvt ár – frá seinast í apríl til seinast í oktober.

Kvikk var tískil bara til fiskiskap einar fimm mánaðir av 2006, men hóast hetta, eydnaðist teimum at fiska fyri út við 8 miljónir krónur.

- Eg vil siga, at tað gekst hampiliga væl, meðan vit vóru í vinnu í fjør, og higartil í ár hevur gongdin kanska verið á eini leið.

Tommy heldur kortini fyri, at tað kundi havt gingið betur í ár, enn tað hevur gjørt.

- Meðan skipið var á beding í Danmark í fjør, róðu eg og ein annar av manningini, sum eigur ein glastrevjabát, Albert Langgaard, nakað út, men annars var ikki tað stóra at takast við.

Hann sigur, at tað var eitt sindur torført at halda upp á manningina í fjør vár, tá menn vistu, at skipið kortini fór at verða leingi úr vinnu í árinum.

- Vit eru vanliga 14 mans við Kvikki, og tað merkist, at so nógv skip eru heimahoyrandi í Klaksvík í dag, sigur Tommy.

Spurdur, hvar teir fara hendan túrin, nú teir tóku agn og ís í gjár, sigur skiparin, at teir fara undir Føroyar at royna.

- Vit eiga 282 tons undir Íslandi, men fara neyvan yvir hagar fyrr enn til heystar. Alternativið er, at vit nú fyrst gera einar tveir undir Føroyum og síðan fara yvir til Íslands, men helst verður ikki lagt vestur um hav fyrr enn í september, sigur hann.

At Kvikk eigur so fræga Íslands-kvotu, kemst av, at ein partur av kvotuni eru dagar, sum felagið hevur keypt.

Vanliga kvotan hjá línubátunum undir Íslandi liggur um eini 217 tons.

- Men vit eiga so hesi 64-65 tonsini aftrat, sigur skiparin.

Tommy vísir á, at hendan tíðin ikki er nakað serlig hjá línubátunum undir Føroyum.

- Misjavnt er, hvussu mars mánaði roynist, men tá vit koma út í apríl, verður hetta ikki hildið at vera góð tíð undir Føroyum, tvørtur ímóti, leggur hann aftrat.

Nú Kvikk loysir aftur, vónar hann, at teir umframt hýsu eisini fara at fáa nakað av toski, sum hevur so góðan prís.

- Seinasta túr førdi bróðir skipið. Tá høvdu teir eini 70.000 pund, harav umleið ein helmingur var hýsa – og hin helmingurin toskur, sigur Tommy Sivertsen.